Búskapur og vinna:

## Toskur fínur matur

Í Noregi er tað vorðið fínari at eta tosk enn laks. Á fiskatorginum í Tromsø kunnu fólk keypa laks fyri einar 30 krónur kilo, meðan toskurin kann kosta tvær ferðir so nógv.

Norska útflutningsráðið sigur, at norðmenn ótu 110.000 tons av fiski í fjør. Av teimum settu fólk 90.000 tons á dørurðaborðið við hús, og hini 20.000 tonsini vórðu etin á matstovum. Tað merkir, at hvør norðmaður át 18,7 kilo av fiski í fjør, og tað er meiri enn undanfarin ár.

Sambært útflutningsráðnum siga hesi tølini, at tað er vorðið fínt at eta tosk, meðan laksurin er vorðin gerandismatur.

## Aftur bót

Skandinaviska flogfelagið SAS hevur aftur fingið bót fyri samstarvið við Maersk Air. Hesaferð er tað virðisbrævamarknaðurin í Stockholm, sum hevur givið SAS bót, tí felagið gav ikki marknaðinum nóg góða kunning, tá ES-nevndin kannaði samstarvið við Maersk Air.

Bótin, sum SAS nú hevur fingið, er 800.000 krónur, men hon er lítil samanborin við tær 290 milliónir krónurnar, sum ES-nevndin dømdi felagið at gjalda seinasta summar.

## Størri nýtsla

Kanningar vísa, at tann privata nýtslan í USA er vaksin nógv skjótari, enn myndugleikarnir høvdu roknað við. Nýtslan minkaði nógv eftir tann 11. september í fjør, men nú vísir tað seg, at amerikanarar aftur eru farnir at nýta pengar.

M. a. vísir kanningin, at eftirspurningurin eftir húsum og íbúðum er vaksin munandi seinastu mánaðarnar, og at húsaprísurin er hækkaður samsvarandi. Kortini sæst, at eftirspurningurin er ymiskur, og í New York, San Fransisco og øðrm stórbýum er húsaprísurin fallin.

Bilasølan verður ofta nýtt sum barometur í USA, og seinastu mánaðarnar er bilasølan vaksin.

UTTAN ÚR HEIMI

# Sharon fyri hvøssum atfinningum

**Avgerðin hjá ísraelsku stjórnini at skipa trygdargeirar, sum skulu avmarka sambandið millum ísraelsmenn og palestinar, møtir harðari mótstøðu aðrastaðni**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*



*Mynd: Reuters*

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, var tann fyrsti at gera viðmerkingar, eftir at Ariel Sharon, forsætisráðharri hevði almannakunngjørt avgerðina hjá ísraelsku stjórnini. Annan segði, at nýggja ísraelska tiltakið fer ikki at bøta umviðurskiftini, og at støðan í Miðeystri líkist meiri og meiri einum veruligum kríggi.

ST-aðalskrivarin legði afturat, at tað er neyðugt við nýhugsan í Miðeystri, og hann mælti trygdarráðnum til at taka upp samband við báðar partar.

Noreg hevur havt ein serligan lut í Miðeysturkreppuni, og norski uttanríkisráðharrin, Jan Petersen, segði í gjár, at hann var beinleiðis vónsvikin av avgerðini hjá ísraelsku stjórnini.

- Eftir mínari uppfatan kunnu hvørki vápn ella trygdargeirar fáa enda á teirri óndu ringrásini í Miðeystri, segði Jan Petersen.

Í sjónvarpsrøðuni segði Sharon, at endamálið við trygdargeirunum er at fáa enda á teimum blóðugu samanbrestunum, men palestinski samráðingarleiðarin, Saeb Erekat, sigur, at ísraelski forsætisráðharrin hevur bara eitt mál, og tað er at halda fram við harðskapinum og at beina fyri friðartilgongdini.

- Bæði vit og tað ísraelska fólkið vilja hava frið og trygg viðurskifti, men nýggju ætlanirnar hjá Sharon fara ikki at geva ísraelsmonnum frið og trygd, segði Saeb Erekat í gjár.

Heldur ikki allir ísraelsmenn taka undir við ætlanini hjá Sharon og stjórn hansara. Nógvir av teimum umleið 200.000 jødunum, sum búgva í teimum palestinsku økjunum, hava greitt tíðindafólki frá, at vænta ikki, at trygdargeirar fara at forða víðgongdum palestinum í at leypa á.

Leiðarin í vinstrasinnaðu andstøðuni í Ísrael, Youri Sarid, segði stutt, at einki nýtt var í røðuni hjá Sharon.

# Vápnahvíld í Sri Lanka

**Stjórnin í Sri Lanka og teir tamilsku uppreistrarmenninir samdust í gjár um at binda frið**

SRI LANKA
*Árni Joensen*

Tað var forsætisráðharrin, Ranil Wickremasinghe, sum boðaði frá vápnahvíldaravtaluni, sum er fingin í lag eftir drúgvar samráðingar. Noreg hevur staðið á odda fyri semingsroyndini, og norski sendiharrin í Colombo, Jon Westborg, fekk í gjár vissu fyri, at srilankiska stjórnin er til reiðar at halda avtaluna, sum teir tamilsku uppreistrarmenninir høvdu góðtikið frammanundan.

Enn er ov tíðliga at siga, um avtalan um vápnahvíld kann fáa enda á borgarakrígnum í Sri Lanka. Hetta kríggj hevur vart í 19 ár og hevur kravt umleið 64.000 mannalív.

Tann nýggja avtalan er ikki einans ein avtala um, at partarnir skulu leggja vápnini. Sambært avtaluni skal stjórnin loyva tamilum at vitja skyldfólk uttan fyri tey økini, sum tamilsku uppreistrarmenninir hava ræðið á, og avtalan sigur eisini, at tamilarnir skulu taka lut í politiskum arbeiði, hvør mál er at tryggja varandi frið.

Í sambandi við undirskrivingina vitjaði Wickremasinghe, forsætisráðharri ein bý tætt við markið til tað økið, sum tamilsku uppreistrarmenninir hava ræðið á, og hetta var fyrstu ferð í tíggju ár, at ein srilanskiskur stjórnarleiðari hevur verið á hesum leiðum.

Úr Norðurlondum:

## Uffe visti alt

Sakførarin hjá fyrrverandi varastjóranum í Royal Greenland, Lars Emil Johansen, vil nú vera við, at Uffe Ellemann-Jensen visti alt um sáttmálan, sum teir báðir fyrrverandi stjórarnir í Royal Greenland høvdu við felagið. Sambært sáttmálunum fingu Lars Emil Johansen og fyrrverandi stjórin, Ole Ramlau Hansen, einar 15 milliónir krónur, tá teir fóru frá í fjør.

Uffe Ellemann. Jensen, sum fór úr nevndini í grønlendska felagnum mánadagin, hevur sagt, at hann visti einki um ta stóru fráfaringarlønina, fyrr enn hann sum nevndarformaður skuldi góðtaka útgjaldið.

Men hetta er ikki rætt, sigur Henrik Nørkær, sum umboðaði Lars Emil Johansen í samráðingunum, tá hesin varð settur í varastjórastarvið í 1997. Henrik Nørkær sigur, at hann samráddist við táverandi stjóran, Ole Ramlau Hansen, og at stjórin alla tíðina kunnaði nevndarformannin, Ove Rovsing, og næstformannin, Uffe Ellemann-Jensen, um gongdina og treytirnar í samráðingunum. Tí visti næstformaðurin alt, sigur sakførarin, men hesum vísir Uffe Ellemann-Jensen aftur.

## Munnkurv

Teir ovastu leiðararnir í norsku verjuni eiga ikki at mótmæla, tá teir eru ósamdir við politikararnar. Tað heldur í hvussu er næstformaðurin í Arbeiðaraflokkinum, Hill-Marta Solberg.

Herfyri segði ein norskur generalur, at politikararnir gjørdu eitt mistak, tá teir feldu eina ætlan um at flyta ovastu loftverjuleiðsluna úr Bodø til Stavang er. Men generalurin átti at tagt, tí teir eiga ikki at spæla politikarar, sigur Hill-Marta Solberg. Verjuleiðslan er sum vera man ikki samd við henni.



# Metingar eftir føroysku prix-luttøkuna



**Sosialurin hevur spurt nøkur fólk, ið hava tilknýti til føroyska tónleikaheimin, hvat teirra meting er av føroysku luttøkuni í Grand Prix kappingini og um, hvussu tey meta avrikið hjá Pæturi við Keldu**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Føroysk luttøka í Grand Prix kappingini, tí donsku, er sum lundi á jólanátt og kann teljast á einari hond, ella rættari, tveimum fingrum. Í 1979 luttók Annika Hoydal og harkalið við sanginum Aldan. Talan var tá um alernativa kapping, har Grønland eisini luttók. Í ár luttók Pætur við Keldu við sangi sínum "Som en drøm". Hann luttók á jøvnum føti við hinar luttakararnar. Hevði sent inn, eins og fleiri enn 600 onnur í Danmark. Pætur endaði á einum flottum 5. plássi.

Nógv er sagt og skrivað um føroysku luttøkuna, men nú eini 14 dagar eru síðani kappingina, og prixaldan er við at leggja seg, hava vit vent okkum til nøkur fólk, fyri at biða tey hyggja í bakspeglið og meta um. Vit hava vent okkum til nøkur fólk, ið hava eitthvørt við føroyska tónleikaheimin at gera og sum tískil mugu metast at hava eina viðkomandi meining og meting. Vit hava biðið tey meta um føroysku luttøkuna og avrikið hjá Pæturi við Keldu.



### Teitur Lassen

Eg haldi, at sangurin hjá Pæturi var sera góður - hann var mín persónligi favorittur. Men eg haldi tó ikki, at sangurin kundi vinna Dansk Melodi Grand Prix 2002. "Som en drøm" er sera væl komponeraður og framførdur, men hann var tó ov stillur og fittur til at vinna. Eri tó sera glaður fyri Pætursa luttøku, og at hann kom so langt við tí hann stendur fyri. Eg hevði atkvøtt hann sum nr. 1 vegna mín smak og eg gitti, at hann samanumtikið bleiv nr. 3, eftir at eg hoyrdi øll løgini.

### Rúna á Heygum

Ikki sørt, at eitt tár vann sær fram í eygnakrókinum, tá eg rúnarbundin og við andakt sat og hugdi at Pæturi við Keldu, ið saman við systir síni framføra prix-lag sítt. Eitt avbera gott lag, og orð, ið góvu framførsluni hjá Pæturi ta heild, ið sjáldan er samansjóvað. Tað vil siga, at persónurin, lag, orð og framførsla vóru beinleiðis í trá við hvørt annað, og ikki er altíð, at hetta hongur saman. Pætur framsetti her eitt vakurt lag - væl sungið - við orðum sum fløva. Harumframt dugdi hann at bera øllum á pallinum, soleiðis at hetta bergtók áhoyraran frá byrjan til enda.

Uttan at blanda politikk millum Danmark og Føroyar saman við tónleiki, burdu vit í Føroyum og



Grønlandi sjálvandi havt okkara egnu luttøku í altjóða Prix- tiltakinum, líkasum vit kunnu luttaka í ítrótti á altjóða støði. Men luttøkan hjá Pæturi er ein varði á vegnum.



### Niels Uni Dam

Eg haldi, at Pætur kláraði seg framúr væl, hann sang betur enn teir flestu, um ikki allir hinir luttakararnir. Sangurin var stak penur, mær dámdi hann væl. Hann hevði ótrúliga dámliga og friðsæla útstráling á pallinum. Eg bleiv satt at siga eitt sindur heitur um hjartað. Tó haldi eg ikki, at ein føroyingur hevur nakað at gera í hasi kappingini. Eg haldi veruliga ikki, at tað ber til at umboða føroyingar undir donskum flaggi. Høvdu føroyingar havt møguleika at atkvøtt, og hevði Pætur kunna sungið undir føroyskum flaggi í einari møguligari finalu, so hevði talan verið um virðing fyri tjóðini Føroyar. Sum nú er, lat Pætur danir snúlta uppá føroyska mentanarskattin.

### Gunhild Andreasen

Leygarkvøldið 9. februar 2002 fekk eg endaliga staðfest fyri mær sjálvari, at danir eru eitt av teimum mest ómusikalsku fólkaslagnum í heiminum. Eg minnist í fjør, júst um hetta leitið, tá eg og vinkona mín sótu úti á Nørrebrúgv, og hugdu at danska Grand Prixnum. Ja, til eitt satt vónbrot, tí øll tey uppskotini, vit høvdu frammi, vóru als ikki tikin við í metingarnar. Tó kom eitt av okkara uppskotum víðari, men gjørdist bert nummar fimm, júst sum Pætur við Keldu. Men lat tað fara, tað var ikki uttan orsøk, at Sasha Dupont, ið var ein av dómarinum, gav Malenu við sanginum " Vis mig hvem du er ", eitt vánaligt skoðsmál. Men Malena sjálv er ein fragd fyri oyrað at hoyra, hon er ein av teimum bestu jazzsangarinnunum, ið danir eiga - eg havi hoyrt tað sjálv. Men sjálvandi, ja sjálvandi, leggur tað núverandi altjóða Grand Prixið ikki upp til jazztónar, men í staðin til lættisoppa popptónleik, eg veit ikki ein gang, um ein kann kallað tað popp, men sjangran er ræðulig. Vit eiga at verða stolt av Pæturi og hansara dygdum, bæði sum sangskrivara, tónleikara, sangara og hansara hátt at framføra sangin uppá. Tað er eitt kynstur. Framferðarhátturin var livandi, dynamiskur og sannførandi og sangurin var yndisligur og forteljandi og bar brá av jazztónum, sum ikki er serliga " in ", tá vit tosa um Grand Prix í nýggjari tíð, tí fekk hann slíka lagnu.Vit mugu heldur ikki gloyma systur hansara, ið við sínum sangevnum gav sanginum meira fyllu.

Tað er bara at vóna, at aðrar tónleikagreinar fáa innivist í altjóða Grand Prixnum, tí nú er tað á einum alt ov vánaligum støði, at man nærum situr á nálum og rodnar og spyr seg sjálvan, brúkti eg aftur í ár tíð uppá hetta her?. Men vit vóna jú øll, at tað gerst betur, og tí hyggja vit og lurta spent hvørja ferð, ja ár eftir ár - men enn havi eg ikki fingið eitt "aha upplivilsi" síðan ABBA tók heimin við stormi.

### Ólavur Hátún

Eg sá bert leysliga í sjónvarpinum. Men eg fekk eitt dámligt intrykk og fegnaðist um úrslitið. Pætur kláraði seg væl og tað kendist inniligt. Tað er einki at taka seg aftur í, at hann hevur evnir. Nú er hatta ikki júst tað slag av



tónleiki, eg fáist við, men eg meti, at hatta var gott og hevði ongar bíligar effektir. Ektað og hjartaligt og sum føroyingur eri eg glaður.